

# Størri vandi fyri at fáa krabbamein í oljuvinnuni

**Jan Müller**

09.06.2014 - 10:33

Oljan.fo

Fólk, sum arbeiða í norsku oljuvinnuni, eru í størri vanda fyri at fáa ymisk sløg asv krabbameini enn hin parturin av norska fólkinum. Talan er eitt nú um hálskrabba og blóðkrabba.

Tað skrivar Dagbladet og vísir til eina nýggja doktararitgerð, sum Jo S. Stenehjem og onnur á Kreftregisteret hava latið úr hondum. Tey hava kannað sambandið millum krabbamein og kemisk evni í arbeiðsumhvørvinum hjá kvinnum og monnum, sum arbeiddu í norsku oljuvinnuni millum 1965 og 1999.

Av teimum 41.140, sum granskararnir kasnnaðu í árunum frá 1999 til 2009, høvdu 2.191 ymisk sløg av krabbameini. Kanningin vísti, at innan summar krabbasjúkur var stórur munur á títtleikanum millum oljufólk og fólk í øðrum vinnum.

Hjá monnunum vóru tilburðirnir fleiri innan eitt nú hálskrabba, men millum kvinnurnar var títtleikin størri av eitt nú blóðkrabba og húðkrabba. Samanumtikið var vandin fyri at fáa krabbamen heldur størri hjá kvinnum enn monnum í oljuvinuni.